# Marin og Hjartavætturin

- *Tað kunnu koma nógv góð ting burtur úr tí, sum ikki er so perfekt.*

Eitt nú ein punkaradadda, langommuvitjanir og ein hjartavættur. Ingun Christensen hevur skrivað eina fitta, herliga og innarliga barnabók, sum rakar beint í gerandisdagin hjá børnum í dag. Bókin er ein tekstbók, sum Kathrina Skarðsá hevur myndprýtt. Rundu og blíðu strokini geva søguni ein nútíðarligan, skemtiligan og inniligan dám. Myndir og tekstur vísa litríkar persónar og hendingar, ið eru sum beint úr okkara tíð. Bókin er væl egnað at lesa fyri børnum, sum ganga í barnagarði eins og Marin.

**Hvør er Marin, sum er høvuðspersónurin í bókini?**

- *Ingun: Hon er um 6 ára aldur, og hon er einabarn. Hon gongur í barnagarði og hevur eina góða vinkonu, sum eitur Amalia. Og so hevur hon tvey øgiliga ambitiøs foreldur, sum arbeiða nógv. Mamman hevur starv í einum banka, og pápin hevur egið virki. Og tey hava so nógv um at vera, at hon verður eitt sindur gloymd í gerandisdegnum.*

**Hvat fekk teg at skriva júst hesa søguna?**

- *Ingun: Tankin var hesin stressaði gerandisdagurin, sum nógv børn í dag hava, tí tey vaksnu hava so øgiliga nógv um oyruni. Hesin mátin, sum vit prioritera í gerandisdegnum. Mátin vit innrætta okkum uppá, ger, at nógv børn kenna seg eitt sindur forsømd. Tað var tað, sum eg hevði hug at skriva um. Hetta rákið í okkara gerandisdegi í dag, at øll hava so ræðuliga nógvan skund. Eisini tað, at vit hava alla hesa tøknina rundan um okkum. Tað er onki galið við tøknini, tað er mátin, vit brúka hana uppá. Tað, sum er beint framman fyri okkum, verður gloymt. Telefonirnar, teldurnar og arbeiðið, sum verður tikið við heim. Tað eru nøkur ting, sum man kanska heldur skuldi prioriterað, sum verða gloymd. Og so verður tað sagt frá úr sjónarhorninum hjá Marini í søguni. Børnini síggja ofta tað, sum vit vaksnu ikki hugsa um.*

**Men søgan er als ikki bara álvarsom, hon er full í skemti og stuttligum hendingum.**

- *Ingun: Tá tað er ein barnabók, so skal tað jú eisini vera eitt sindur spennandi. Tað er ikki so forferdiliga heppið, at vit hava so nógv stress og so nógvan skund í dag. Men tað kann lýsast á ein hátt, sum ger, at vit betur kunnu svølgja tað og samstundis skilja tað. Tað er altíð søgan, sum er kjarnin, tá eg skrivi. Men samstundis kann eg draga nógv ymisk element inn. Eg havi viljað fingið fram, at Marin er eitt sindur eftirhugsin. Hon hevur kanska eitt sindur betur tíð at hugsa enn onnur børn. Og tað er ikki bara negativt, tað formar eisini eitt barn. Onki er jú perfekt her í lívinum. Tað kunnu koma nógv góð ting burtur úr tí, sum ikki er so perfekt.*

**Tað er júst tað. Nógv gott kemur burtur úr hesi óperfektu støðuni. Marin hevur eina kula daddu, sum finnur upp á mangt stuttligt og løgið, og hon vitjar fittu langommuna, sum altíð hevur góða tíð.**

- *Av tí, at foreldrini hava so nógv at gera, so plagar ein hálvvaksin genta, Randi, at heinta Marina í barnagarðinum. Hon setur eitt sindur av kulør á gerandisdagin hjá Marini. Marin heldur, at hon sigur nógv løgin orð, og so sær hon nokk so serlig út við ringum allastaðni, lillaðum hári og ymiskum litum á neglunum. Marin er ein vanlig*

*seks ára gomul genta, sum nógvar gentur í dag helst kunnu relatera til. Men so kemur hon í støður, sum kanska ikki eru so øgiliga vanligar fyri seks ára gamlar gentur. Randi er ein sovorðin farvurík týpa, sum finnur upp á sovorðið, sum tannáringar gera. Og so sleppur Marin at uppliva nøkur ting, sum hon annars ikki hevði upplivað.*

**Og so fær Marin Hjartavætturin, eina gamla dukku, sum langomman sjálv hevur verið so góð við sum barn. Hvønn leiklut spælir hann?**

- *Ingun: Langomma Marina hevur góða tíð og skilir hana. Hon gevur henni Hjartavætturin fyri, at hon ikki skal kenna seg so einsamalla. Hann er eitt súmbol upp á kærleika og umsorgan. Hann kann ikki broyta støðuna, men hann kann kanska broyta mátan, sum hon kennir støðuna.*

Bókadeild Føroya Lærarafelags gav bókina út. Hon er innbundin og 55 bls.